# Um damptrolaran »Tróndur í Gøtu«

## Í dag er "Tróndur í Gøtu" kendur sum eitt av okkara stóru nótaskipum

Men tað hevur verið ein annar "Tróndur í Gøtu", sum umboðar eitt ávíst tíðarskeið og ein ávísan part av okkara fiskiveiðisøgu.

Sofus var sjálvur eitt skifti við Tróndi. Annars var tað svágur hansara Leon Joensen, sum var stjóri

### Fóru avstað fulllastaðir við koli

"Tróndur í Gøtu" var ein av teimum mongu koltrolarunum, sum komu til landið beint eftir seinna heimsbardaga.

Tað, sum hesir trolarar mest skiltu seg frá einum fiskiskipi, vit kenna í dag, er júst dampmaskinan, har orkan var kol. Hetta merkti, at tá ið skipið fór avstað, var tað nærum fult av koli. Tað var bert fremsti partur av lastini, sum var tøkur til fisk. Trolararnir vóru so tungt lastaðir av koli, at teir ta fyrstu tíðina bert kundu royna í góðum veðri.

Men kolagoymslan tømdist skjótt. Og tað var uppgávan hjá kyndarunum at fáa kolið fram til maskinuna og síðan at "leggja aftrat" fýrinum, sum tørvur var á. Kyndarar skuldu so við hóskandi millumbilum fáa øskuna fyri borð aftur. Komu skipini í nógvan fisk beinanvegin, kundi tað væl henda, at neyðugt varð at koyra kol fyri borð fyri at fáa pláss fyri fiskinum.

Skipini vóru partvíst á saltfiskaveiði 30 monnum og partvíst á ísfiskaveiði við 20 monnum.

### Gøtumenn keypa trolara

Tað var í 1946, at gøtumenn tóku stig til at keypa trolara. Teir stovnaðu p/f Tyril, sum flestu fiskimenn í sóknini settu pening í. Partapeningurin var 125.000 krónur, sum vóru nógvir pengar tá í tíðini.

Fyrsti skipari fram til 1951 var kendi skiparin, Richard Jacobsen úr Klaksvík, sum í bók síni "Mín lívssøga til skips" hevur greitt frá fyrstu árunum hjá skipinum.

Trolarin hevði verið í herflotanum eins og teir flestu ensku trolararnir, og varð umbygdur í Leith.

Her hendi tað, at fíggingin av umbyggingini ikki var í lagi. Og trolarin slapp ikki avstað, fyri enn rokningin var goldin. At fáa hetta greitt, var nú ikki sum at siga tað. Skipið slapp avstað við teirri treyt, at skiparin ikki skuldi taka eitt oyra út í løn, fyrr enn rokningin varð goldin.



*Hendan myndin av manningini á Tróndi í Gøtu er frá 1952, tá ið Grækaris Hansen var skipari: Menninir eru frá vinstru: Evald Jacobsen, Syðrugøtu, Evald Mikkelsen, Syðrugøtu, Elias Martin Tvørfoss, Norðragøtu, Andrass Olsen, Syðrugøtu, Joen Simon Isaksen, Noðragøtu, Gunnar Olsen, Syðrugøtu. Miðraðið: Leif Berg, Søldafjørður (hvítklæddur), Hans Pauli Olsen, Lorvík, (við keppi), Jógvan Jacobsen, Tórshavn (við keppi og sigarett, pápi Simma), Ernst Mikkelsen, Skáli (aftanfyri Jógvan), Sámal Hans Hansen, Norðragøtu (hálvfjaldur), Frants Jacobsen, Norðragøtu (2.stýrmaður, í kaskjett), Per Martin Thomsen, Syðrugøtu (1.stýrimaður), Hans Jacob Hansen, Syðrugøtu, Jørgen Thomsen, Skáli, Ludvig Sivertsen, Syðrugøtu (frammanfyri Jørgen), Eyðálvur Isaksen, Norðragøtu, Erik Vangberg, Syðrugøtu (kokkur). Fremsta rað: Kjartan Gregersen, Syðrugøtu, Emil Joensen, Froðbæ, Johan Olsen, Gøtugjógv (aftanfyri Emil) og Hendrik Jacobsen, Skipanes (kyndari).*




*Tróndur í Gøtu var flaggskipið í Gøtu fyri 60 árum síðani. Um nakrar vikur kemur seinasti navnin, sum eisini er eitt frægari far*

Í desember 1946 kemur "Tróndur í Gøtu" á Gøtu. Tann tá nýggja bryggjan var full av fólki og flaggað varð um alla bygdina. Hildin varð stór veitsla, men um kvøldið kom stormur av landsynningi, og teir máttu fara á Klaksvík.

Fyrsta túrin varð farið avstað 10. januar 1947 til leiðirnar við Norðurnoreg á ísfiskaveiði. Nógvur fiskur var. Eftir 10 døgum varð fingið uppí og farið varð til Grimsby at selja. Gjørdir vóru tríggir ísfiskatúrar í hesum legginum og selt varð fyri tilsamans 23.000 pund, umleið hálva miljón krónur. Og tá varð rokningin fyri umbyggingina eisini goldin.

Seinni varð farið til Bjarnoynna á saltfiskaveiði.

### Vanlukkur

Tey næstu árini gingu á nakað sama hátt. Í 1948 høvdu teir ein samanstoyt við ein enskan trolara, sum mundi beint fyri teimum. Tað, sum bjargaði teimum, var, at teir fingu stappað madrassir í holið, og tá kundu pumpurnar halda lens.

Í 1948 mistu teir ein mann, Hans David Ranghamar, 42 ára gamal. Eftir hann sat einkja við fýra børnum. Teir høvdu júst hálað, og tað var nógvur fiskur í trolinum. Tann fyrsti posin var tikin, og teir snodlaðu uppí annan posan, men av tí, at tað var so stór alda, stóð so nógv á snodlaranum, at tørnið fór av spælkoppinum, og alt netið fór út aftur. Tá var tað, at Hans David varð tikin við. Hann slongdist langt upp leysur av netinum, og teir sóu hann ikki aftur. Eingin ljóskastari var, og tað var kolamyrk nátt, so har gjørdist einki.

Í 1951 hendi ein onnur vanlukka, sum kravdi mannalív. Tað var Anthon Bernhard, Benni, Hansen. Hann skuldi fara tvørtur um ein trolara á veg um borð í Aberdeen. Hann leyp av lúnningini niður á lastalúkuna á hesum trolara. Tað var so óheppið, at presendingin var løgd yvir lúkuna, so tað sá út, sum um lúkan var á. Men tað var hon ikki. Benni fór í lastina og doyði seinni á sjúkrahúsi í Aberdeen. Eftir sat einkja við 7 børnum, tað minsta 2 ára gamalt.

Richard fór av seinast í 1951, og aðrir skiparar vóru Reinhold Thomsen og Grækaris Hansen úr Norðragøtu.

### Rættilig bygdafyritøka

"Tróndur í Gøtu" var ein rættilig bygdafyritøka, sum kom at merkja nógv fyri bygdina. Roynt var at syrgja fyri, at so nógvir mans kundu sigla við uppá skift sum gjørligt. Árini hjá Richardi var samlaða manningartalið fylgjandi:

| | |
|---|---|
| 1947 | 73 mans |
| 1948 | 62 - |
| 1949 | 58 - |
| 1950 | 76 - |
| 1951 | 57 - |

Her vóru nógvir mans, sum fingu eina uppá seg góða inntøku.

Sum ein lýsing av inntøkunum tá í tíðini, skulu vit lýsa ársinntøkurnar í 1949 hjá ymiskum skipabólkum, soleiðis sum hesar verða uppgivnar í bókaverkinum "Fiskivinna og Fiskivinnumál" hjá Erlendi Paturssyni:

| | |
|---|---|
| Skonnart | kr. 5.459 |
| Slupp | kr. 4.655 |
| Trolari | kr. 8.538 |

Flestu fiskimenn sigldu við slupp, so í mun til inntøkurnar har, var tað eitt kvett at sleppa við trolara. Sum frá leið minkaðu úrtøkurnar við trolarunum, og tað gjørdist trupult at fáa fólk.

Aftrat øllum hesum arbeiðsplássunum kom so arbeiðið, sum skipið gav á landi, tá ið saltfiskur varð landaður og virkaður. Reiðaríið hevði eisini bygt sítt egna hús, Tyrlahúsið kallað, til hetta arbeiðið. Tá ið landað varð, fingu skúlabørnini frí, og tey vóru nógv, sum tjentu nakrar tiltrongar krónur, sum so sanniliga ikki vóru nógvar av tá í tíðini.

Men tá ið komið var út til miðjuna av 50-unum, høvdu hesir trolarar havt sína tíð. Teir vóru jú gamlir, longu tá ið teir vórðu keyptir. Og tíðin var farin frá kolfýrdum skipum. Tó var onkur, sum fekk oljufýring. Men teir flestu av hesum trolarum vórðu seldir sum gamalt jarn. Onkrir vóru á garnaveiði eftir sild, og júst her upplivdu vit størstu vanlukku á sjónum í nýggjari tíð. Tað var, tá ið "Stella Argus" hvarv seinast í oktober 1957 við fleiri enn 20 monnum umborð.

**Komandi partur**

Komandi tríggir partar verða um Müllerættina í Grønlandi, grundað á tilfar, sum ikki hevur verið frammi fyrr.

Sosialurin